


*Kvinnurnar takkaðu fyri seg eftir tapið fyri Italia, men í veruleikanum eru tað vit, sum takka. Takk fyri!*

Italia-Føroyar 30-22 (16-10):

# Tað eru vit, sum takka

**Føroyska kvinnulandsliðið tapti finaludystin móti Italia, men samanlagt var talan um ein stóran sigur. Bæði fyri kvinnurnar á liðnum, og fyri føroyskan kvinnuhondbólt yvirhøvur**

CHALLENGE-TROPHY
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Mezzocorona, Italia: Lat tað bara verða sagt alt fyri eitt. Italia varð ein ov stórur gloypibiti hjá okkara hondbóltskvinnum, sum sunnudagin leiktu finaluna í Challenge-Trophy kappingini.

### Ferðin á mun

Fyrstu lítlu løtuna sá annars út til, at tað enn einaferð skuldi gerast fantastiska stuttligt at vera føroyingur. Annika Ljósstein tóktist í øllum førum ætla at geva italska liðnum ein skelk, og tá seks minuttir vóru leikti, stóð 2-1 til okkara á máltalvuni.

Men so var sum so eisini liðugt. Italska liðið leyp upp á 7-2, áðrenn okkara fingu gjørt nakað, og eftir hetta gjørdist talan ongantíð um ein spennandi dyst. At føroyska liðið so mátti vera skaddu Joan M. Djordjevic fyri uttan, og at Katrin á Neystabø alla tíðina var sjónliga darvað av sínum skaða, merkti eisini, at álopsvápnini hjá okkara fækkaðust í tali.

Og so var munurin á liðnum nokk eisini ov stórur. Ikki minst í leikferðini, har italsku vertirnir megnaðu at halda eitt tempo, sum lág fleiri stig omanfyri tað, sum hini liðini hava víst, og eisini høvdu at kalla allar eitt framúr fótskifti, sum hevði við sær, at føroyska verjan ofta varð fangað upp á millumhond.

Tað skal tó liggja okkara til stórt rós, at tær ikki í somikið sum hálvt sekund góvu skarvin yvir. Tað mundu orsøkirnar annar vera góðar til, tá Italia fyrstu løtuna eftir steðgin øktu til 19-10, men heldur ikki hetta fekk tær at gevast. Tær hildu áhaldandi fram at stríðast, og tá seinasta bríksli hevði ljóðað, var hetta eisini nakað, sum tær fingu at merkja frá áskoðarunum.

Tí tað kundi væl vera, at Italia nú hevði vunnið kappingina framman fyri heimaáskoðarunum, men tað var føroyska liðið, sum fekk størstu klappini, tá tær alt fyri eitt komu út at takka fáu tandrunum av føroyingunum, sum vóru á skiftisbeinkinum.

### Dramatikkur

Hóast spenningurin soleiðis ikki var tann heilt stóri í finaludystinum, so var talan um ein dyst við nøkrum sera dramatiskum innsløgum.

Annika Ljósstein mundi helst vera tann føroyski leikarin, sum hevði staðið seg best í dystinum, men fyri hennara viðkomandi fekk dysturin ein bráðan enda. Í eini gjøgnumbrotsroynd varð hon harðliga tikin, og úrslitið gjørdist ein brotin nøs. Tað sá ikki tespiligt út, soleiðis sum blóðið fossaði av henni, og helst gjørdist hetta ov nógv fyri ein av áskoðarunum í høllini.

Bussførarin hjá Luksemburg small brádliga í gólvið av áskoðaraplássunum, so hjálparfólk við børu máttu koma inn eftir honum, og eisini varð ein onnur kona styðja úr høllini.

Annika Ljósstein varð eftir dystin koyrd á sjúkrahús í Mezzocorona, men seinni um kvøldið var hon tó kortini komin somikið fyri seg, at hon kundi fáa sær ein bita saman við øllum hinum hondbóltshøllini á galladøgurðanum, sum fyriskipararnir høvdu lagt í eitt velduga stórt víntapparí. Og sum eina eyka troyst, so fekk hon tá eisini eina serstaku medalju, sum varð latin teirra, sum fullu í stríðnum.

### Sigur hóast alt

Og fram um alt, so má sigast, at hóast finalutapið, so var talan um ein veldugan sigur fyri føroysku kvinnurnar.

Fyrst og fremst, so sýndu tær hinum tjóðunum, at vit so væl og virðiliga kunnu spæla hondbólt heima í Føroyum. Sæð burtur frá Italia, so mundi føroyska spælið vera tað vakrasta á at líta, og tó at teknisk mistøk eisini vórðu framd, so megnaðu okkara sera væl tekniska partin av spælinum.

At liðið so eisini hevur nakrar einstaklingar av teimum stóru, er einki at ivast í. Eitt nú kundi Katrin á Neystabø helst verið ovarligari enn sítt sætta pláss á máltindinum, um hon hevði tikið lut í øllum fimm dystunum, men hinvegin skal pausan, sum hon fekk fríggjadagin, vera henni væl unt.

Og hini londini máttu eisini yvirgeva seg til lítlu Føroyar. Fleiri høvdu á munni, hvussu fantastiskt tað var, at vit við 45.000 sálum í landinum kundu hava eitt somikið gott lið, og longu undan heimferðini fekk HSF í øllum førum tvær innbjóðingar um at koma at taka lut í kappingum av ymsum slag.

Enn er so ikki avgjørt, hvørt tikið verður av hesum, og fyrst og fremst er tað helst ein fíggjarligur spurningur. Men nú er møguleikin komin, og hann hevði ongantíð verið til staðar, var tað ikki fyri luttøkuna í Challenge-Trophy og tey framúr avrik, sum okkara hondbóltskvinnur framdu har.



*Og so er tíð at hyggja at, hvussu steypið sær út. Simona, Anna Maria, Lív og Nikolina síggja tó ikki út til at vera heilt samdar í skoðsmálinum*



*Hóast bæði vatt og ísur máttu á nøsina, so vildi Annika upp eftir medaljuni, áðrenn hon fór á sjúkrahúsið*

## Finalan í tølum

**Italia-Føroyar 30-22 (16-10)**

Føroyskir málskjúttar: Simona Hansen 5(1), Gunnleyg Berg 5(2), Annika Ljósstein 5, Katrin á Neystabø 3, Nikolina Eyðbjørnsdóttir 2, Gurið Mortensen 1, Una Olsen 1
Føroysk brotskøst: Gunnleyg Berg 3/2, Simona Hansen 1/1, Katrin á Neystabø 1/
Italiensk brotskøst: 9/5
Føroyskar útvísingar: Gunnleyg Berg 2, Anna Kristina Samson 1, Una Olsen 1, Annika Ljósstein 1, Katrin á Neystabø 1
Ísraelskar útvísingar: 4





| SANDAVÁGUR | TEL. | MIÐVÁGUR | TEL. | VATNSOYRAR | TEL. | SØRVÁGUR | TEL. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Hjá Peturi | 333 320 | Føroya Keypssamtøka | 332 950 | Sp/f John Poulsen | 332 034 | Sp/f Handilsv. Niclasen | 332 001 |
| Janita | 333 888 | Telebúðin | 332 000 | | | Statoilst. Úti á Bakka | 332 855 |
| Klædnabúðin | 333 668 | Sp/f Leivur Nattestad | 333 509 | **FLOGVØLLURIN** | **TEL.** | Gávubúðin Kurvin | 333 380 |
| Bartalstova | 332 250 | Hjørleif Joensen | 332 379 | Gávubúðin Prýði | 358 850 | Hjá Sannu, Fa | 333 750 |
| Hjá Káru | 333 939 | Hjá Jákup | 333 417 | | | Hjá Valdemar | 332 861 |
| Vakstrarhúsið Dáin | 332 364 | Blómukjallarin | 332 425 | | | Løðuhandilin | 332 002 |
| Sandavágs Timburhandil | 332 700 | Hjá Randi | 333 870 | | | Sørvágs skósøla | 332 153 |
| Hjá Ingu-Kiosk | 333 839 | | | | | Sørvágs Ursmiðja | 332 024 |
| Piff Paff Puff | 332 332 | | | | | Hotel Vágar | 332 955 |

FELAGIÐ VÁGAR

